


# Øl, vín og dunna

**Enn eru tølini fyri í ár ikki gjørd upp, men undanfarin ár vísa, at føroyingar undan jólum keypa meira og meira av øli og víni. Og dunna er vanligi jóladøgurðin**

Jóladrykkir
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Føroyingum dámar væl eina bjór ella kanska helst vín til jóla. Og her verður kanska mest hugsað um jóladøgurðan.

Vínmentanin er ikki gomul í Føroyum. Og føroyingar hava neyvan av álvara tikið vínmentanina til sín, fyrr enn fyri fáum árum síðani. Kassamentanin, brennivínskamtanin í kvartalsportiónum, hvarv og Rúsan kom. Og við henni nýggj mentan, nýggj drykkimynstur.

## Øl og vín

Gjørd upp í seldar litrar í desember, siga tølini hjá Rúsuni í desember í 2003 og 2004, at nøgdin av øli og víni økist.

Í desember í 2004 var samlaða uppgjørda litratalið av ølið 144.034. Í desember 2003 var talið 140.228. Ein øking er at hóma.

Tá talan er um vín, so hómast eisini ein øling. Í desember í 2003 var litratalið av víni 47.532, og í desember í 2004 var talið 48.882.

Tá talan er um brennivín, so er tó eisini vøkstur. Litratalið sigur 14.236 í desember 2004, mótvegis 13.792 í desember 2003. Men á Rúsdrekkasøluni siga tey, at sølan flytir seg meira til veikaru sløgini og tað hevur hon gjørt seinnu árini. Hetta ávirkar eisini søluyvirskotið hjá Rúsuni, ið eisini stendur veikari.

Men hinvegin tykist drykkimentanin so eisini hava flutt seg frá sterka brennivíninum og til vín og øl, ella veikaru sløgini.

Tølini fyri í ár eru ikki gjørd upp, men sølan í krónum fyri november vísir eina lítla lækkin í mun til í fjør, somu tíð. Í november í 2004 var samlaða sølan komin uppá 86 milliónir og 470 túsund krónur. Í november í ár var talið nakað minni, nevniliga nakað oman fyri 84 millónir. Men m. a. verkfall hevur okkurt at siga viðvíkjandi minkaðu sølutølunum.

## Dunna og nakkasteik

Óivað er tað so í dag, at hjá mongum er ein útvald fløska av víni afturvið jóladøgurðanum. Og jóladøgurðin í ár er sambært slaktaranum í SMS dunna og nakkasteik. Hetta halda tey hjá slaktaranum koma av, at dunna er ikki so dýr, meðan eittnú gás er dýrari uppá seg. Tí er tað dunna og nakkasteik, ið fólk flest keypa sum jóladøgurða í ár.



NOA NOA
miniature
2-12 ár



Opið til jóla:
15. des til 21. des
kl. 10 - 20

(sunnudag 18. des
opið kl. 14-20)

22. des - 23. des
kl. 10-23

NOA® NOA
Tróndargøta 29
tel 318200

NOA NOA
NÝGGJ
JÓLAKOLLEKTIÓN
HEIMKOMIN

